52-037/2019

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

**Løgtingið**

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 37/2019 eftir tingskipanini § 52 a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingsmanni, um fund við kinesisku sendistovuna**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Hví var landsstýrismaðurin í fíggjarmálum á fundinum við kinesisku sendistovuna í november?

2. Hví var landsstýrismaðurin í vinnumálum ikki á fundinum?

3. Hevur landsstýrið/løgmansskrivstovan ella onnur aðalráð ráðført seg ella samskift við danska uttanríkismálaráðið í sambandi við fundin og nógv umrødda fútabannið?

4. Um svarið til spurning 3 er ja, hvør var so tilráðingin hjá danska uttanríkismálaráðnum?

**Svar:**

Eg havi spurt meg fyri hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum, Umhvørvis- og vinnumálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum um málið og kann hereftir svara soleiðis:

**Til 1.**
Landsstýrisfólk hava javnan fundir við umboð fyri útlendskar myndugleikar.

Umrøddi fundurin varð umbiðin av kinesisku sendistovuni í Danmark, sum ynskti at fáa fund við landsstýrismannin í uttanríkis- og mentamálum, løgmann og landsstýrismannin í fíggjarmálum. Hetta er orsøkin til, at tað ikki vóru onnur umboð fyri landsstýrið við á fundinum.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum tekur sær, sbr. § 9, stk. 2, nr. 6 í málsbýtisfráboðanini, av ognarskapi landsins í P/f Føroya Tele.

**Til 2.**
Kinesiska sendistovan hevði ikki biðið um fund við landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum. Landsstýrismaðurin umsitur heldur ikki ognarskap landsins í P/f Føroya Tele, men tekur sær, sbr. málsbýtisfráboðanini § 38, nr. 144, av fjarskiftislóggávuni sum heild.

**Til 3 og 4.**
Fyrispurningurin verður ikki svaraður vísandi til tingskipanina § 52 a, stk. 4, 3. pkt. Grundin er, at talan er um trúnaðarmál. Eg vísi til, at spurningarnir eru umrøddir á trúnaðarfundi í uttanlandsnevndini 11. desember 2019.

Tinganesi, 20. desember 2019

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo